# Brúktir bilar á uppboðssølu



*Staravegur var stongdur fyri allari ferðslu, meðan uppboðssølan fór fram*

**Leygardagin var ein uppboðssøla av brúktum bilum hjá Berg Motors á Hálsi í Havn**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Uppboðssøla av brúktum bilum var hjá Berg Motors á Hálsi seinasta leygardag Tað var Bjørn á Heygum advokatur, sum var uppboðshaldari.

Staravegur, vegurin fram við bilasøluni hjá Berg Motors, var stongdur fyri ferðslu, so uppboðssølan av bilunum kundi ganga fyri seg ótarnað.

Uppboðssølan byrjaði klokkan 10 um morgunin, og nógv fólk møttu upp. Summi tí tey høvdu í hyggju at bjóða upp á ein bil og onnur bert fyri at forvitnast. Ein uppboðssøla er áhugaverd, tí har gongur nakað fyri seg. Í hesum førinum var tað Bjørn á Heygum, sum er góðkendur uppboðshaldari, sum skipaði fyri uppboðssøluni. Nógv bjóðaðu upp á bilarnar, og 29 av teimum tilsamans 35 bilunum vórðu seldir, tá uppboðssølan var liðug.



*Bjørn á Heygum var uppboðshaldari*



# Alt sær so ljósareytt út

Á klárgeringsdeildini hjá Berg Motors á Hálsi arbeiða tríggjar ungar kvinnur, sum eru einastu starvsfólkini á tí deildini. Tað eru tær tríggjar Rannvá Álaberg, sum er leiðari í klárgeringshøllini, Nathleen Fagradal og Annika Heinesen.

Fyri at seta kulør á tilveruna og gera vart við at tær gera eitt arbeiði, sum vanliga verður roknað sum mannfólkaarbeiði, mála tær nú klárgeringshøllina ljósareyða.

*Rannvá Álaberg, leiðari á klárgeringshøllini, Nathleen Fagradal og Annika Heinesen*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*